PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

## Leiguprísir og treytir

Fundarhøli 1 er útgjørt við serstakari tekniskari útgerð til fundarhald og framløgur.

Fundarhøli 2 hevur uppvørpu, leysa telduuppvørpu og talvu.

Køkurin og køksútgerðin er írokna leigumálini omanfyri, men kann tó leigast fyri seg. Kaffiautomatin tó bert eftir nærri avtalu.

Starvsfólkini hjá Búnaðarstovuni brúka køkin í arbeiðstíðini.

Vesi eru í forhøllini eins og uppi í skiftingarrúminum omanfyri køkin.

Hølini skulu latast aftur í sama standi sum við byrjan, tó uttan reingering.

## Leiguprísir:

| | |
|---|---|
| Styttri fundir/tiltøk max. 4 tímar | 800 |
| Longri fundir/tiltøk (allan dagin) | 1.500 |
| Telduútgerð og interaktiv-talva (høli 1) pr. tiltak | +500 |
| Køkurin (fyri seg) | 500 |
| Tiltøk, sum hava beinleiðis við landbúnaðin at gera | 50% |







PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

**Búnaðarstovan**
**Frammi í Dali 166**
**410 Kollafjørður**
**Tlf: 479000**
**Fax: 479020**

# Leiðbeining fyri útleigan av fundarhølunum

www.bst.fo



PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com

# Leiðbeining til leigarar av hølunum

- Góðu leigarar!!
- Út frá reglugerðini vilja vit við hesum faldara leiðbeina, hvussu tit skulu fyrihalda tykkum í sambandi við leigu av okkara felagshølum.
- Tit venda tykkum til avgreiðsluna, har tit fáa lykil og eitt loynital til tjóvarí – og brunaávaringina. Legg til merkis, at tjóvarí og brunaávaring er framvegis virkin inn á skrivstovurnar og avgreiðsluna.
- Hølini mugu latast aftur í sama standi, sum tá tit komu inn. Tó fyri uttan reingering. Ruskbingja stendur omanfyri ovara bygningin.
- Verður nakað av týdningi brotið, verða tit biðin um at siga okkum frá. Endurgjald verður lagt afturat leiguni.
- Búnaðarstovan skilar sær rætt til at meta um tiltøkini einsæris, og um tey eru egnaði ella ikki. Búnaðarstovan skilar sær rætt til at nokta útleigan, um mett verður, at tiltakið er óegnað. Hølini verða ikki leigaði út til veitslur.
- 

- Gjørt verður vart við, at starvsfólkini á Búnaðarstovuni brúka køkin og vesini í arbeiðstíðini.
- Ikki er loyvt at taka ognir stovnsins út úr húsinum.
- Ikki er loyvt at roykja í hølunum.
- Minnist til at taka allar egnar lutir við heim. Búnaðarstovan tekur sær ikki ábyrgd av mistum lutum og gloymdum klæðum otl.
- Leigarin hevur skyldu at halda tær almennu ásetingar, sum verða settar í sambandi við útleigan, og ábyrgdast leigarin fyri teimum, meðan leigutíðin er.
- Vit senda rokning eftir vitjanina.



## Búnaðarstovan

Frammi í Dali 166
410 Kollafjørður

Telefon: 47 90 00
Fax: 47 90 20
E-mail: bst@bst.fo

PDF-XChange
Click to buy NOW!
www.docu-track.com